Dimmalætting

NR. 93 • Leygardagur 24. juni 1995 • 118. árgangur • Tlf. 11212 • Fax. 10941

Juni 1995 dagur	SÓLIN upp	í suðri	niður	Longd á degnum	Munur vetur summar
24 Ley Tórshavn	3.41	13.29	23.17	19.36	+14.35 + 0.01
25 Sun	3.42	13.30	23.17	19.35	+14.34 + 0.02
26 Mán	3.42	13.30	23.17	19.34	+14.33 + 0.02
24 Ley Mykines	3.44	13.33	23.22	19.38	+14.40 + 0.01
25 Sun	3.44	13.33	23.22	19.38	+14.39 + 0.02
26 Mán	3.45	13.33	23.22	19.37	+14.38 + 0.02
24 Ley Sumba	3.50	13.29	23.08	19.19	+14.03 + 0.01
25 Sun	3.50	13.29	23.08	19.18	+14.02 + 0.01
26 Mán	3.51	13.30	23.08	19.17	+14.01 + 0.02
24 Ley Viðareiði	3.35	13.28	23.22	19.47	+14.55 + 0.01
25 Sun	3.35	13.29	23.21	19.46	+14.54 + 0.02
26 Mán	3.36	13.29	23.21	19.45	+14.53 + 0.03

Juni 1995 dagur	MÁNIN upp	í suðri	niður
24 Ley Tórshavn	2.18	10.43	19.22
25 Sun	2.45	11.30	20.24
26 Mán	3.20	12.17	21.17
24 Ley Mykines	2.21	10.46	19.26
25 Sun	2.48	11.33	20.28
26 Mán	3.23	12.21	21.21
24 Ley Sumba	2.22	10.42	19.17
25 Sun	2.49	11.29	20.19
26 Mán	3.25	12.17	21.11
24 Ley Viðareiði	2.15	10.42	19.23
25 Sun	2.41	11.29	20.26
26 Mán	3.16	12.16	21.19

Føroyingar fegnast: – Skil er í Shell

Shell í Føroyum hevur fingið fleiri reaksjónir, eftir at avgerð varð tikin um at sleppa ætlanunum at søkkja Brent Spar. »Skil er í Shell. Tað visti eg altíð«, stendur í einum faksi, ið Shell hevur fingið.

KARTIN L. HANSEN

Stjórin hjá Shell í Føroyum, Hjarnar Djurhuus, fegnast um, at Shell avgjørdi at sleppa ætlanunum at søkkja boripallin, Brent Spar.

– Hatta var tann skilabesta loysnin, sigur Hjarnar Djurhuus.

Hann heldur tó fast við tað, sum Shell og bretska stjórnin hava borið fram um, at tað var best fyri umhvørvið og tryggast at søkkja Brent Spar.

– Men tað var ikki tað, sum hetta málið snúði seg um. Trupulleikin er, at tá ein hevur fingið loyvi at søkkja, hvat so við øllum hinum sum koma aftaná? Hetta hava fólk jú rætt at spyrja seg sjálvi, sigur Hjarnar Djurhuus.

Fegnast um avgerðina

Eisini føroyingar hava fegnast um avgerðina hjá Shell. Hjarnar Djurhuus sigur, at fólk hava ringt og faksað til Shell fyri at vísa teirra stuðul til avgerðina hjá Shell.

Millum annað skrivar ein í einum faksi: »Skil er í Shell. Tað visti eg altíð. Heilsan«. Faksið er undirskrivað við kundanummari.

Hjarnar Djurhuus sigur, at teir ikki fingu nógv mótmæli. – Føroyingar eru vanliga sera róligir, og tað hava teir eisini verið í hesum føri, sigur Hjarnar Djurhuus.

Tó hevur onkur ringt og hótt við, at tað fór at fáa fylgjur. Eisini hóttu tiggju føroysk feløg við, at tað fór at fáa fylgjur fyri sambandi millum føroysku fiskivinnuna og Shell, um Shell tvíhelt um ætlanirnar at søkkja Brent Spar.

Kjak um Brent Spar

Beint nú verður boripallurin sleipaður norðan fyri Skotland. Ætlanin er at gera ymsar ábøtur í Hetlandi um vikuskiftið.

Hvørgar pallurin síðani verður sleipaður er ikki greitt, men norðmenn hava boðið sær til at høgga pallin upp.

– Vit hava fingið eitt bræv frá Shell, har teir siga, at teir fara at biðja um loyvi at toga Brent Spar inn í ein norskan fjør og høgga hann upp, segði norski ídnaðarmálaráðharrin, Jens Stoltenberg, hósdagin.

Málið um Brent Spar hevur birt undir kjakið um, hvussu óljuútbunaður skal beinast burtur.

Umhvørvismálaráðharrarnir í ES høvdu fund um málið hósdagin, men teir komu ikki ásamt um, hvussu oljuútbunaður skal beinast burtur á skilabesta hátt.

ES-kommisserurin í umhvørvismálum, Ritt Bjerregaard, segði eftir fundin, at hon vildi arbeiða fyri einum forboði at beina oljuútbunað burtur við at søkkja hann í havið.

Bretar hava verið firtnir líka síðani Shell avgjørdi at sleppa ætlanunum at søkkja boripallin. Bretski umhvørvismálaráðharrin, John Gummer, var týðuliga argur um europeisku atfinningarnar ímóti Brent Spar. Hósdagin ákærdi hann Danmark fyri at vera tað »skitnasta« landið í Europa.

Brent Spar hevur rættliga verið ein fjølmiðlahending, og hetta hevur onkur roynt at gjørt sær dælt av. Eystarríski handilsmaðurin, Norbert Brust, segði hósdagin, at hann bjóðaði sær til at yvirtaka Brent Spar, og umbyggja boripallin til eitt flótandi kasino og diskotek.

Tíðindir uttaneftir

REUTER

John Major bjóðar konservativum av

Forsætisráðharrin í Bretlandi hevur bjóðað mótstøðumonnunum í konservativa flokkinum av. John Major hevur lagt frá sær sum floksformaður, og heitir nú á atfinningarsomu flokstelagarnar um at stilla upp til formansvalið ella at tiga.

John Major hevur fingið nóg mikið av atfinningunum hjá mótstøðumonnunum í konservativa flokkinum, og púra óvæntað hevur hann lagt frá sær sum formaður í flokkinum.

– Ein leiðari er bara leiðari so leingi flokkurin stuðlar hann. Hetta ger seg eisini galdandi fyri meg, segði John Major.

– Eg kann ikki longur góðtaka verandi støðu. Antin stilla tú sjálvir upp til formansvalið ella gevast tit við atfinningunum, legði bretski forsætisráðharrin aftur at.

Fyrsta umfar av formansvalinum í konservativa flokkinum verður 4. juli, men hetta er sjálvandi treytað av, at nakað mótvalevnið stillar upp.

Stjórnarráðharrarnir Michael Heseltine og Michael Portillo, sum fleiri eygleiðarar annars halda vera møguligar eftirmenn hjá John Major, hava boðað frá, at teir stuðla forsætisráðharran.

Men konservativi tjóðartingslimurin Barry Field, ið saman við fleiri øðrum í flokkinum finst harðliga at politikkinum hjá John Major mótvegis Evropasamveldinum, segði, at fleiri floksfelagar longu hava heitt á hann um at stilla upp.

– John Major er ein hampamaður, men hann er ein tapari. Flokkurin hevur brúk fyri einum manni, sum kann sýrgja fyri, at vit vinna valið í 1997, segði Tony Marlow, ið stuðlar Barry Field.

Palestinarar í samhugaverkfalli

Palestinarar á hersetta Vestara Aarbakka skipaðu fyri aðalverkfalli í gjár. Endamálið var at vísa samhuga við túsundatals palestinskum fangum, sum hava verið í hungursverkfalli í eina viku. Fangarnir sita í ísraelskum fongslum, og teir krevja at verða latnir leysir.

Hetta er fyrstu ferð í fleiri mánaðir, at verkfall hevur verið á Vestara Aarbakka.

Handlar og fyritøkur vóru afturlatin í gjár, men apotek og bakari vóru opin, so fólk kundu fáa brúneyðugar vørur.

At kalla eingin ferðsla var á Vestara Aarbakka, og í arabiska partinum av Jerusalem vóru hvørki fólk ella bílar í gøtunum.

Ein nevnd, sum er mannað við fyrrverandi fangum, fekk aðalverkfallið í lag. Kravt verður, at ísraelsku myndugleikarnir láta leysar meira enn 5.000 palestinarar, sum framvegis sita í ísraelskum fongslum, hóast Ísrael og PLO gjørdu friðaravtalu fyri tveimum árum síðani.

Løgfrøðingar, sum hava samband við fangarnar, siga, at nú eru umleið 2.000 fangar í hungursverkfalli.

Danir skuldsettir fyri at dálka illa

Bretski umhvørvismálaráðharrin vil vera við, at Danmark er skitnasta landið í Evropa. Hetta segði hann á einum fundi millum umhvørvismálaráðharrarnar í ES, har málið um Brent Spar boripallin var á skránni.

John Gummer, umhvørvismálaráðharri í Bretlandi, sum er í øðini um atfinningarnar frá evropeiskum londum í sambandi við loyvið, ið bretska stjórnin gav Shell at søkkja Brent Spar, skuldsetti Danmark fyri at vera skitnasta landið í Evropa.

– Air og vøtn í Danmark eru so dálkað, at hundar, sum drekka úr teimum, doyggja eftir fáum minuttum, segði John Gummer á ES-ráðharrafundinum í Luksemborg hósdagin.

– Einki annað land hevur dálkað Norðsjógvin so illa sum Danmark, legði John Gummer afturat.

Bretski umhvørvismálaráðharrin vísti øllum atfinninginum móti Bretlandi aftur. John Gummer segði, at Bretland er tað landið, sum ansar best eftir umhvørvinum.

Svend Auken, umhvørvismálaráðharri í Danmark, svaraði beinanvegin aftur.

– Skuldsetingarnar hjá John Gummer eru púra burturvið. Øll vita, at strangar umhvørvisreglur eru galdandi í Danmark, segði Svend Auken.

Á fundinum millum umhvørvismálaráðharrarnir í ES-londunum varð millum annað tosað um at gera eina avtalu, sum sigur, at eingin boripallur skal søkkjast.

Men hetta vildi John Gummer heldur ikki hoyra talan um.

– Vit hava longu eina felags yvirlýsing, har sagt verður, at støða skal takast til spurningin í hvørjum einstøkum føri, segði bretski umhvørvismálaráðharrin.

Svend Auken kveistraði burtur grundgevingina hjá bretska starvsbróðurinum.

– Hetta er so vitleyst, at vit kunnu ikki gera annað enn at fyrigeva manninum. Hann er í einari truplari støðu, segði Svend Auken, og legði afturat, at Danmark ikki ætlar sær at fara undir eitt umhvørviskríggi við Bretland.

Eingin flatmaðkur í Danmark enn

Men her hjá okkum hava vit væl av honum, eins og teir hava hann í Norðurírland. Hann oyðileggur moldina við at eta allan reyðmaðkin.

BEATE L. JENSEN

Fleiri lond, serliga her í Norðurlondum eru álvarsliga hótt av einum New Zealendskum flatmaðki.

Hann finst longu í Føroyum, men í Danmark hava teir enn ikki merkt nakað til hansara.

Flatmaðkurin líkist ógvuliga nógv einum vanligum reyðmaðki, men hann ger stóran skaða við at eta vanligu reyðmaðkarnar, sum finnast í jørðini.

Tað eru jú reyðmaðkarnir, sum gera jørðina poknuta, so hon er hóskandi til allan vøkstur.

Tá flatmaðkarnir eta reyðmaðkarnir, er eingin til at gera jørðina poknuta longur, og moldin gerst meiri føst í tí. Harvið minka møguleikarnir at fáa nakað at grógva.

Líkist burturfrá

Í Norðurírlandi hevur flatmaðkurin verið leingi. Tað siggja teir á fløtunum, sum gerast harðar sum betong, tí flatmaðkurin hevur etið allan reyðmaðkin.

Flatmaðkurin kann gerast upp til 20 cm langur. Omaná er hann myrkabrúnur við einum veikum violettum liti og eini ljósabrúnari rond. Undir búkinum er hann ljósari við brúnum blettum.

Hildið verður, at hesin maðkur upprunaliga er komin úr New Zealandi til Norðurírlands við plantum og øðrum vøkstri.

Fyri nøkrum árum síðani sást hann fyrstu ferð í Føroyum, men í Danmark finst hann, sum sagt, ikki enn.

Ferd'nand



Veðrið

Eitt hátrýst yvir bretsku oyggjunum mennist, og fer eitt sindur norðureftir. Lyggj og slavin luft rekur móti Føroyum av útsynningi.

Í dag:
Lot ella gul av útsynningi, 3 til 8 m/s. Tað verður turt og skýggjað, men eystanfyri sær sólin møguliga. Annars kann roknast við mjørka. Hitalagið: um dagin millum 12 og 17 hitastig, um náttina niður í 7 hitastig.

Í morgin, mánadagin, týsdagin og mikudagin:

Fleyr ella lot av vestri ella av ymsum ættum, minni enn 5 m/s. Turt og sólglottar, men kanska mjørki. Hitalagið: um dagin millum 10 og 15 hitastig, um náttina niður í umleið 7 hitastig.

Veðurvánirnar til á miðdegi í dag, leygardagin:

Hatton-, Ytsti- og Ytribanki:
Útsynningur og sunnan, 7 til 12 m/s. Mjørki í støðum annars tolulig sýni.

Mýlingsgrunnur og íslandsryggur:
Útsynningur, 8 til 13 m/s. Leygarnáttina eitt skifti minni vindur, 3 til 8 m/s. Mjørki ella driv í støðum annars tolulig sýni.

Føroyabanki, Bankaryggur, Munkagrunnur, Vesturhavið, Norðhavið og havið eystanfyri Føroyar:
Útsynningur, 3 til 8 m/s. Mjørki í støðum og eitt skifti regn, annars tolulig sýni.